## Støðan, danska 1. deild

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Køge | 15 | 12 | 1 | 2 | 32 | 13 | 19 | 37 |
| 2 | Frem | 15 | 9 | 5 | 1 | 33 | 15 | 18 | 32 |
| 3 | HFK Sønderj. | 15 | 9 | 3 | 3 | 31 | 19 | 12 | 30 |
| 4 | Farum | 15 | 8 | 5 | 2 | 31 | 21 | 10 | 29 |
| 5 | B 1913 | 15 | 8 | 3 | 4 | 28 | 23 | 5 | 27 |
| 6 | AC Horsens | 15 | 6 | 5 | 4 | 21 | 15 | 6 | 23 |
| 7 | Herfølge | 15 | 6 | 5 | 4 | 23 | 18 | 5 | 23 |
| 8 | Randers F. | 15 | 5 | 5 | 5 | 22 | 20 | 2 | 20 |
| 9 | Brønshøj | 15 | 5 | 3 | 7 | 24 | 28 | -4 | 18 |
| 10 | FC Aarhus | 15 | 4 | 5 | 6 | 22 | 26 | -4 | 17 |
| 11 | Hvidovre | 15 | 3 | 6 | 6 | 22 | 30 | -8 | 15 |
| 12 | B 1909 | 15 | 4 | 3 | 8 | 27 | 38 | -11 | 15 |
| 13 | Fredericia | 15 | 3 | 4 | 8 | 19 | 22 | -3 | 13 |
| 14 | B93 | 15 | 3 | 3 | 9 | 21 | 36 | -15 | 12 |
| 15 | Kolding IF | 15 | 3 | 1 | 11 | 28 | 43 | -15 | 10 |
| 16 | Skive | 15 | 2 | 3 | 10 | 19 | 36 | -17 | 9 |

30 umfør. Tvey tey fremstu liðini flyta beinleiðis upp í superliguna. Niðastu trý liðini flyta í 2. deild.
Føroyskir leikarar: Óli Johannesen (Hvidovre), Atli Gregersen (Randers Freja)

## Støðan, hollendska toto-deildin

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Excelsoir + | 13 | 9 | 2 | 2 | 24 | 10 | 14 | 29 |
| 2 | RBC Roo'daal | 13 | 8 | 3 | 2 | 31 | 15 | 16 | 27 |
| 3 | Emmen | 12 | 8 | 3 | 1 | 27 | 13 | 14 | 27 |
| 4 | ADO Den Haag | 12 | 7 | 3 | 2 | 20 | 10 | 10 | 24 |
| 5 | FC Zwolle | 12 | 7 | 3 | 2 | 21 | 15 | 6 | 24 |
| 6 | BV Veendam | 13 | 6 | 4 | 3 | 26 | 19 | 7 | 22 |
| 7 | Cambuur/L. | 13 | 6 | 3 | 4 | 20 | 13 | 7 | 21 |
| 8 | FC Volendam | 13 | 6 | 2 | 5 | 27 | 19 | 8 | 20 |
| 9 | Dordrecht '90 | 13 | 5 | 3 | 5 | 21 | 20 | 1 | 18 |
| 10 | Haarlem | 13 | 4 | 4 | 5 | 16 | 18 | -2 | 16 |
| 11 | Storm/Telstar | 12 | 4 | 2 | 6 | 18 | 16 | 2 | 14 |
| 12 | Heracles A. | 13 | 4 | 2 | 7 | 19 | 20 | -1 | 14 |
| 13 | G.A. Eagles | 13 | 3 | 5 | 5 | 24 | 26 | -2 | 14 |
| 14 | Helmond Sp. | 13 | 3 | 4 | 6 | 8 | 20 | -12 | 13 |
| 15 | VVV | 13 | 4 | 0 | 9 | 22 | 28 | -6 | 12 |
| 16 | MVV | 13 | 3 | 3 | 7 | 18 | 25 | -7 | 12 |
| 17 | Top/Oss | 13 | 2 | 1 | 10 | 9 | 38 | -29 | 7 |
| 18 | Eindhoven | 13 | 1 | 3 | 9 | 13 | 39 | -26 | 6 |

Perioduvinnarnari eru merktir »+«
34 umfør. Besta liðið flytir beinleiðis upp í heiðursdeildina. Perioduvinnarnari dystast saman við veikastu liðunum úr heiðursdeildini um eitt pláss í heiðursdeildini.
Føroyskir leikarar: Súni Olsen (FC Zwolle)

## Støðan, enska 3. deild

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Plymouth | 18 | 11 | 5 | 2 | 27 | 11 | 16 | 38 |
| 2 | Rochdale | 18 | 11 | 4 | 3 | 29 | 17 | 12 | 37 |
| 3 | Luton | 18 | 11 | 3 | 4 | 39 | 22 | 17 | 36 |
| 4 | Mansfield | 18 | 10 | 4 | 4 | 30 | 21 | 9 | 34 |
| 5 | Hull | 18 | 9 | 6 | 3 | 32 | 20 | 12 | 33 |
| 6 | Scunthorpe | 18 | 7 | 7 | 4 | 29 | 19 | 10 | 28 |
| 7 | Shrewsbury | 18 | 8 | 4 | 6 | 28 | 23 | 5 | 28 |
| 8 | R&D | 18 | 6 | 8 | 4 | 20 | 16 | 4 | 26 |
| 9 | Darlington | 18 | 6 | 5 | 7 | 22 | 22 | 0 | 23 |
| 10 | Southend | 18 | 7 | 2 | 9 | 22 | 22 | 0 | 23 |
| 11 | Cheltenham | 18 | 5 | 8 | 5 | 24 | 25 | -1 | 23 |
| 12 | Kidderm. | 18 | 6 | 5 | 7 | 15 | 18 | -3 | 23 |
| 13 | Lincoln C. | 18 | 5 | 7 | 6 | 19 | 19 | 0 | 22 |
| 14 | Leyton O. | 18 | 6 | 4 | 8 | 25 | 31 | -6 | 22 |
| 15 | Hartlepool | 18 | 6 | 3 | 9 | 20 | 17 | 3 | 21 |
| 16 | York | 18 | 6 | 3 | 9 | 23 | 31 | -8 | 21 |
| 17 | Torquay | 18 | 6 | 3 | 9 | 15 | 25 | -10 | 21 |
| 18 | Swansea | 18 | 5 | 5 | 8 | 24 | 30 | -6 | 20 |
| 19 | Bristol R. | 18 | 5 | 5 | 8 | 14 | 21 | -7 | 20 |
| 20 | Exeter | 18 | 5 | 5 | 8 | 20 | 34 | -14 | 20 |
| 21 | Oxford Utd. | 18 | 4 | 7 | 7 | 17 | 19 | -2 | 19 |
| 22 | Carlisle | 18 | 3 | 7 | 8 | 15 | 23 | -8 | 16 |
| 23 | Macclesfield | 18 | 3 | 7 | 8 | 12 | 22 | -10 | 16 |
| 24 | Halifax | 18 | 3 | 7 | 8 | 12 | 25 | -13 | 16 |

46 umfør. Tvey tey fremstu liðini flyta beinleiðis upp í 2. deild. Liðini frá 3-6 spæla play-off dystir um seinasta uppflytingarsessin. Niðasta liðið flytir niður í Conference-deildina.
Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull City)




*Hóast teir ferð eftir ferð verða mettir sum »outsidarar«, so heldur Slovenia treiskliga á fram við at taka fótbóltsserfrøðingarnar á bóli*

# Slovenia steðgar ikki á

**Liðið, sum fyri einum ári síðani misti stig á Svangaskarði hevur hósdagin møguleika at spæla seg til HM-endaspælið**

ALTJÓÐA FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Leygarkvøldið vóru fyrstu av teimum sonevndu play-off dystunum fyri europeiska partin av HM-undankappingini leiktir. Hetta eru dystir millum tey lið, sum gjørdust næst best í sínum undankappingarbólkum, og sum tískil ikki vunnu sær beinleiðis atgongumerki til HM.

### Slovenia heldur áfram

Eitt av hesum liðum er Slovenia, sum gjørdist nummar tvey í okkara bólki í hesari undankapping.

Tá teir fyri tveimum árum síðani vunnu á Ukraina í líkandi støðu, var tosað um, at hetta var ein sensatión av teimum heilt stóru, og skelkurin úr lítlu fótbóltstjóðini mundi ikki gerast minni, tá teir í EM-endaspælinum vóru á odda 3-0 móti stórveldinum, Jugoslavia.

Hesin dysturin endaði tó 3-3. Slovenia vann seg ikki úr innleiðandi bólkunum, og tá teir so fyri góðum ári síðani mistu stig á Svangaskarði móti Føroyum, roknaðu tey flestu við, at hetta var líka sum tað frá teirra síðu.

Slovenar hava tó víst seg at vera treiskari enn tey flestu, og í seinasta dystinum í undankappingarbólkinum tryggjaðu teir sær rættin til play-off dystir við at vinna 3-0 á okkara monnum.

Aftur hesa ferð mundu tey flestu halda, at nú steðgaði slovenska ævintýrið, tí mótstøðuliðið var nú Rumenia, sum ígjøgnum gott og væl eitt tíggjuáraskeið hevur havt eitt landslið, sum hevur verið at roknað millum tey stinnastu í Europa.

Eftir dystin leygardagin er tó staðfest, at Slovenia veruliga skal roknast við, tá fótbóltsvaldið í Europa verður ásett. Enn eru teir ikki komnir til HM, men 2-1 sigurin á Rumenia gevur teimum í øllum førum ein góðan møguleika at røkka hesum máli. Alt sá annars ut til at ganga eftir bókini, tá Marius Niculae legði Rumenia á odda um miðjan fyrra hálvleik, men við málum frá Acimovic og Osterc koppaðu slovenar øllum á høvdið.

### Einki er avgjørt

Annars gav eingin av hinum fýra dystnum eina greiða ábending um, hvat lið fer at vinna seg fram til endaspælið.

Best man tað standa til í Írlandi, sum fekk eitt heppið lutakast, tá tað varð greitt, at teir skuldu dystast móti Iran um eitt HM-atgongumerki. Á Landsdowne Road vann Írland 2-0 á Iran við málum frá Ian Harte og Robbie Keane, og hóast tað í løtum stóð nógv á móti Iranum, so er sigurin ein góð barlast at hava í viðførinum, tá farið verður til Teheran. At Írland so noyðist at vera Roy Keane fyri uttan til hendan dystin er hinvegin ein strika í rokningini. Liðskiparin segðist vera klárur at spæla dystin leygardagin, eftir at hann hevur stríðst við ein knæskaða, og hóast hann spældi allar 90 minuttirnar, so versnaði skaðin somikið nógv, at ein skurðviðgerð nú tykist sannlík.

Eisini Turkaland tykist vera væl fyri, eftir at einsamalla málið hjá Burur var nóg mikið til at tryggja ein útisigur á Eysturríki, eins og tað má metast sum eitt gott útgangsstøði hjá Týsklandi, at teir megnaðu at spæla javnt, 1-1, í Kiev móti Ukraina. Her legði heimaliðið seg tíðliga á odda við einum málið frá Zubov, men á hálva tímanum javnaði Ballack til endaligu støðuna.

Seinasti dysturin leygardagin var ímllum Belgia og Kekkia, og her tykist alt opið, eftir at Belgia vann heimadystin 1-0. Málið skeyt Gert Verheyen.

Seinnu play-off dystirnir verða leiktir mikukvøldið.



# Klaksvíkingar vunnu toppdystin



*John Arni Nilssen fær eina torføra uppgávu komandi vikuskiftið, tá hann á fremsta borðið skal royna seg móti donskum stórmeistara*

**Hóast skerdir vunnu klaksvíkingar dystin á vestmenningum, og liggja nú liðini bæði jøvn á fremsta plássi**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Undan kappingarbyrjan varð mett at klaksvíkingar, vestmenningar og toppin, og júst soleiðis er núverandi støða eftir fýra umfør í liðkappingini. Vestmenningar hava havt leiðsluna, men leygardagin mátti teir lúta á fyrsta sinni ár ímóti klaksvíkingum.

### Spenningur í Klaksvík

IM John Rødgaard hevur sera gott tak á tí framfýsna Ólavi Simonsen úr Klaksvík, og hetta prógvaði hann eisini um vikuskifti í Vestmanna. Teir hittust sum høvdingar á fyrsta borði, og enn einaferð reistist John sum vinnari eftir loknan dyst. Rani Nolsøe sum ikki var við klaksvíksliðnum hendan dystin, sigur at talvið var beint eftir bókini, við fáum feilum og sera góðum spæli frá báðum telvarum. John sum hevði svarta fólkið vann loksins.

Annað borð mannaðu fyrrverandi føroyameistarnar Torbjørn Thomsen og Steintór Rasmussen. Talvið var javnt og kundi fara báðar vegir, men í tíðarneyðini eydnaðist tað Steintóri at vinna stríðið. Ein góður sigur hjá Steintóri.

Tummas Martin Anthoniussen hevur fingið eina góða kappingarbyrjan, og hesum mátti vestmenningurin John Jacobsen ásanna. Tummas Martin fekk øgiligt trýst á John, og undir trýstinum misti John ov nógv materiali og gavst tí. Ungi klaksvíkingurin Rúni Dragaberg fekk ein góðan javnleik ímóti tí roynda Kára Durhuus á fjórða borði.

Tískil ein kærkomin 2,5 - 1,5 sigur til sigursvanda felagið úr Klaksvík, sum hendan dagin var skert uttan Rana Nolsøe. Úrslitið boðar frá góðum sæð við klaksvíkseygum.

### Javnt í Hvalvík

Havnarmenn eru enn ikki veruliga komnir í gongd, men kanska er tað eingin vanlukka. Teir lógu nevnliga í fjør leingi og lúrdu aftanfyri toppliðini, men so við eitt tóku teir lop framum øll favorittliðini og vunnu loksins trygt 1. deild.

Í Hvalvík fingu havnarmenn tvey stig heimaftur. Navnarnir Martin Poulsen og Brekká hittust á fyrsta borði, og endin varð at hesin fyrsti vann talvið. Olaf Berg fekk tó ikki knekkað tí meira roynda Finnbjørn Zachariassen, sum vísti rutinu við at basa unga havnarmannin.

Herluf Hansen sum í fjør hevði eina ringa kapping, hevur í ár verið álitið á liðnum. Hann vann leygardagin á Sámal Christiansen, meðan fjórða borði hjá hvalvíkingum, Hanus Brekká vann á Andias Ziska, sum als ikki hevur havt eydnuna við sær í fyrru helvt. Hanus Brekká er búsitandi niðri, og verður neyvan við á hvalvíksliðnum framhaldandi í kappingini.

2-2 er eitt gott úrslit hjá hvalvíkingum sum nú ikki eru einsamallir í botninum.

Í Kollafirði vunnu GM Tiger H. Persson & co ein tryggan 3-1 sigur á HT 2. Tiger vann eftir ætlan á Jóhan Gaard, sum tó var treiskur í eini 30 leikir.

Tann kendi kollfirðingurin Hans Kristian Simonsen vann eftir tógvið stríð á Óla Joensen. Óli leyp hvassiliga á, men Hans Kristian vardi væl og fekk fyrimun og vann hareftir trygt.

Á triðja borði hevði havnarmaðurin Johan E. Hansen allar møguleikarnar ímóti Eyðálvi Johannesen, men telvaði alt ov óneyvt í endatalvinum og hetta revsaði kollfirðingurin til fulnar. Jógvan Næs úr havnini hevur verið álitið hjá HT 2. Hann hevur ikki gjørt mætari enn at hava vunnið øll síni fýra talv fyri liðið á fjórða borði. Møguliga eitt gjøgnumbrot fyri tann annars roynda telvaran. Leygardagin vann Jógvan ruddiliga á tí unga Árant Djurhuus.

Kollfirðingar fingu luft eftir hendan dyst, meðan havnarmennirnir muga ásannað at tungt verður at yvirliva í fremstu deildini.

### Støðan eftir 4. umfar

| | |
|---|---|
| KTF | 10,5 |
| VT | 10,5 |
| HT | 8,5 |
| KT | 7,5 |
| HT2 | 5,5 |
| TFS | 5,5 |

### Toftamenn beina kós

Við 3,5 — 0,5 sigri á vestmenningum hava toftamenn tikið leiðsluna í 2. deild. Tað er góða gamla liðið við Jens Kristian Hansen, Helga Joensen, Wenzil Højgaard og superveterananum Jústines Hansen, sum enn einaferð eru á veg ímóti hægri málum.

Toppdysturin hetta vikuskifti var millum sandavágsmenn og runavíkingar. Dysturin endaði 2-2, har eitt nú Bjarki Ziska fekk javnleik ímóti Torkil Nielsen. Helst eru runavíkingar best nøgdir við úrslitið. Seinasti dysturin í 2. deild varð í Gøtu har klaksvíkingar vitjaðu. Gøtumenn vunnu 2,5 — 1,5.

### Støðan í 2. deild

| | |
|---|---|
| TT | 11,0 |
| RT | 10,0 |
| ST | 9,5 |
| KTF | 7,0 |
| GT | 5,5 |
| VT | 4 ,0 |

Í 3. deild liggja havnarfeløgini bæði enn í oddanum. Eftir fýra umfør hava liðini javnlík stig, meðan sandavágsmenn óvæntað bert eru eitt stig aftanfyri. HT3 vann 3-1 á Róki, meðan HT4 vann tepurt á vestmenningum. Triði dysturin varð millum kollfirðingar við kendum nøvnum so sum Hanus Joensen og Hans J. Petersen á liðnum, og sandavágsmenn. Hesir seinastu vunnu heldur óvæntað 2,5 — 1,5.

### Støðan í 3. deild

| | |
|---|---|
| HT4 | 10,0 |
| HT3 | 10,0 |
| ST | 9,0 |
| Rókur | 6,5 |
| VT | 6,0 |
| KT | 5,5 |

### 5. umfar

Allar deildirnar fáa nú tvey talvfrí vikuskifti. Fimta umfar verður nevnliga ikki leikt fyrrenn 2. desember.

Í 1. deild verða hesir dystir: HT — VT, KTF — KT og HT2 — TFS. Í 2. deild verður áhugaverdur oddadystur millum RT og TT.

Føroyska talvfelagið í Keypmannahavn, sum er á odda í donsku 2. deild, skal komandi vikuskifti hitta sterka liðið úr Helsingør. Fyrsta borði hjá føroyingunum, John Arni Nilssen fær torføra uppgávu, tí yvir av honum situr tá stórmeistarin Sune Berg Hansen.